# 6

# KJARNUMÁL



STYTT ARBEIÐSVIKA

TÍÐARAVMARKAÐ STØRV

LIVIKORSKANNINGAR

PARTTÍÐAR STØRV

GREIÐ MØRK MILLUM ARBEIÐI OG FRÍTÍÐ

FØRLEIKAMENNING

**Starvsmannafelagið**

VALÁRIÐ 2019

… í fólksins tænastu



*Súni Selfoss,*

*Formaður í Starvsmannafelagnum*

# Seta løntakaran á breddan

Í seinasta lagi 31. august verður løgtingsval. Í tí sambandi vil Starvsmannafelagið aftur varpa ljós á nøkur arbeiðsmarknaðarmál, sum hava týdning fyri løntakaran. Vit vóna at hesi kjarnumálini verða partur av valstríðnum, og at politisku flokkarnir taka tey til sín.

Sum størsta fakfelagið á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum hevur Starvmannafelagið kosið sær 6 kjarnumál í valárinum 2019. Hetta eru mál, sum álitisfólkini og nevndin í Starvsmannafelagnum meta hava alstóran týdning bæði fyri samfelagið sum heild og fyri limir felagsins sum løntakarar.

Endamálið við hesum tiltaki er at varpa ljós á løntakaramál, sum hava týdning fyri allar limir í Starvsmannafelagnum, og ivaleyst fyri føroyskar løntakarar sum heild. Júst hvat tað góða samfelagið er, eru ógvuliga nógvar ymiskar meiningar um, eisini millum limir Starvsmannafelagsins. Tó eru allir limir Starvsmannafelagsins løntakarar, og øll í felagnum verða ávirkaði av hvørji rættindi og skyldur vit hava á arbeiðsmarknaðinum.

Starvsmannafelagið heldur tað hava stóran týdning, at mál av arbeiðsmarknaðarligum slagi fáa pláss í komandi valstríðnum. Vón okkara er at flokkarnir fara at hugsa um og taka kjarnumálini til sín, og at málini fara at síggjast aftur í komandi valstríði, eins væl og í einum komandi samgonguskjali.

Felags fyri øll málini er, at hetta eru mál, sum hava ítøkiliga ávirkan á livikor løntakaranna í Føroyum. Tað eru mál, ið fremja tryggleika, fyribyrgja sálarligt trýst, og leggja dent á einstaka menniskjað og familjuna. Hetta eru mál, sum gera, at Føroyar standa seg betri í kappingini um arbeiðsmegi, og geva einstaka løntakaranum í Føroyum eitt betri lív við meira yvirskoti og innihaldi.

Eg vil við hesum leggja dent á, at hetta er eitt partapolitiskt óheft átak. Starvsmannafelagið stuðlar ikki nøkrum ávísum flokki. Vit stuðla limum okkara og vilja arbeiða fyri, at teirra áhugamál verða raðfest. Fyri at gera hetta krevst, at vit eisini gera okkara ávirkan galdandi í politiska rúminum, serliga tá um ræður mál, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki varða av einsamallir.

Hettar er aðru ferð, at Starvsmannafelagið skipar fyri hesum tiltaki. Fyrru ferð var upp undir løgtingsvalið í 2015, og sóust fleiri av kjarnumálunum tá aftur í samgonguskjalinum, eins og fleiri síðani eru samtykt av løgtinginum.

Við hesum tiltaki vónar Starvsmannafelagið at eggja limum sínum og borgarunum annars at nýta sín demokratiska atkvøðurætt. Valið er títt.

***Gott løgtingsval!***




*Álitisfólkini í Starvsmannafelagnum fyrireika kjarnumálini fyri 2019*

**Til ber at lesa grundgevingarnar hjá flokkunum í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo**

## Um innihaldið

**Allir flokkar, sum vóru stillaðir upp, tá evsta mark var fyri at lata tilfar inn, fingu møguleikan at taka støðu til kjarnumál Starvsmannafelagsins. Fólkaflokkurin hevur ikki svarað og er tískil ikki við.**

**ÚTGEVARI**
Starvsmannafelagið
J. H. Schrøtersgøta 9
Postsmoga 165
110 Tórshavn
Telefon 61 48 68
T-postur: starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo
Heimasíða: http://www.starvsmannafelag.fo

SKRIVSTOVUTÍÐ: kl. 09:00 – 16:00
TELEFONTÍÐ: kl. 10:00 – 15:00, eingin telefonviðtala mikudag

**NEVND**
Súni Selfoss, formaður
Bjørg Jacobsen, næstforkvinna
Svend Åge Seloy, nevndarlimur
Hilmar Augustinussen, nevndarlimur
Noomi K. Rasmussen, nevndarlimur

**FELAGSSKRIVARI**
Anna D. Johannesen

**SAMSKIPARI**
Guðrið Joensen

**RÁÐGEVI**
Dánjal Højgaard

**TRYGGINGARRÁÐGEVI**
John Kjær, tlf. 218187

**SOSIALRÁÐGEVI**
Leif Olsen, tlf. 316339

Starvsmannafelagið er limur í:
Norðulendsku felagsskapunum
NTR, NSO og
Altjóða felagsskapinum PSI

**STARVSBLAÐIÐ**
Verður sent limum Starvsmannafelagsins ókeypis einferð um árið.

**LAGT TIL RÆTTIS**
Starvsmannafelagið
Nevndin (ábyrgd)

**GRAFISKT SNIÐ OG LAYOUT**
Heidi í Dali Jacobsen, Sosialurin

**SAMSKIPAN OG HØVUNDI**
Regin Berg

**MYNDIR**
Tróndur Dalsgarð
Jens Kristian Vang
Dánjal Højgaard

**FORSÍÐUMYND**
Nevndin, umsitingin og álitisfólkini í Starvsmannafelagnum

**STARVSMANNAFELAGIÐ - STÓRT, BREITT OG STERKT**

Starvsmannafelagið er fakfelag hjá starvsfólkum, sum starvast hjá landi, kommunum, kommunalum felagsskapum og almennum partafeløgum.
Felagið hevur umleið 2.000 limir.
Endamál felagsins er á demokratiskum og javnstøðiligum grundarlagi støðugt at virka fyri betri arbeiðskorum.

Millum limirnar finna vit omanfyri 300 ymisk starvsheiti, so á ein hátt er Starvsmannafelagið tað, sum grannalondini rópa eitt meginfakfelag (fakforbund).
Tí siga vit ofta, at Starvsmannafelagið er eyðkent av at vera stórt, breitt og sterkt.

# 1 Stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar

Við at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar, íroknað døgurðasteðgin, fáast fleiri gagnligar avleiðingar. Javnvágin millum frítíð og arbeiðslív verður betri, og harvið kann strongdin minka og familjusambondini styrkna. Somuleiðis gerst tað lættari at arbeiða fulla tíð á fleiri fakøkjum, eins og tey, ið arbeiða niðursetta tíð, nærkast eini fullari løn og eftirløn. Kanningar og royndir aðrastaðni benda eisini á, at ein styttri arbeiðsvika økir um dygdina í arbeiðinum, minkar um fráveruna og økir um nøgdsemið.

## Flokkarnir halda:

**Sambandsflokkurin**
*Støðan í føroyska samfelagnum er, at tað sum heild er mangul uppá arbeiðsmegi og tí vil ein stytting av arbeiðstíðini bara gera støðuna enn verri*

**Framtakið**
*Arnfinn á Birtuni t.d. er heitur fortalari fyri universalari borgaraløn (UBI). Tað hevði sett fólk fríð at arbeiða sum tey vilja.*

**Tjóðveldi**
*Royndir aðrastaðni – til dømis í Danmark, har arbeiðsvikan, ásett í sáttmálum, í mesta lagi er 37 tímar – vísa, at kappingarførið og effektivitetur ikki versna orsakað av styttri arbeiðsviku...*

**Miðflokkurin**
*Eitt slíkt stig hevði verið ein útrætt hond til dagsins familjur, sum tíverri, sum fylgja av dýrtíðini, eru hart spentar fyri.*

*Lesið øll svarini í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo*

## Starvsmannafelagið heldur:

*At arbeiðsvikan eigur at styttast niður í 37 tímar við lóg*

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| Flokkur | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | | | ✓ |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | | ✓ | |
| Miðflokkurin | ✓ | | |
| Framtakið | | ✓ | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

# Styttri arbeiðsvika – betri lívsgóðska



Ein styttri arbeiðsvika ber fram móti fleiri gagnligum málum. Ein fær meira yvirskot, verður glaðari, og tað kann vera við at gera, at títtleikin av bæði strongd og øðrum sálarligum avbjóðingum minkar.

Starvsmannafelagið gjørdi eina kanning millum limir sínar í 2014, sum vísti, at meira enn helvtin hevði havt illgruna um strongd seinastu 3 árini. 61,5% av teimum spurdu mettu, at strongdin stavaði frá arbeiðsplássinum, harav 69% av teimum, ið mettu tað halda, at tað er vegna ov stóra arbeiðsbyrðu.

Við styttri arbeiðsviku fáa fólk í størri mun tíð og yvirskot at vera saman við børnum og øðrum familjulimum, og kann hetta vera við at tryggja, at tað er rúm fyri familjum í dagsins samfelagi.

Í nógvum starvsgreinum er arbeiðið so mikið tungt ella krevjandi, at tað kann vera ómetaliga strævið at arbeiða fulla tíð, tá ið fulla tíðin er 40 tímar. Ein styttri arbeiðsvika ger tað lættari hjá fólki at arbeiða fulla tíð, eins og hon hevði gjørt, at tey, sum arbeiða parttíð, eru nærri við at arbeiða fulla tíð, soleiðis at lønin hjá teimum hækkar samsvarandi.

Søguliga hevur evsta markið fyri, hvussu long arbeiðsvikan í Føroyum kann vera, verið ásett við løgtingslóg. Seinast, arbeiðsvikan varð stytt við lóg, var í 1978. Frammanundan var hon stytt í 1970 og 1964.

Við at stytta arbeiðsvikuna við lóg tryggja vit, at umstøðurnar eru tær somu hjá øllum á arbeiðsmarknaðinum. Í tí sambandi hevði tað eisini verið viðkomandi at hugt at, hvørt onkur sløg av arbeiði eru so mikið tung, at fulla arbeiðstíðin eigur at vera tað minni.

Ein atfinning kann vera, at arbeiðsloysið er ov lágt at lækka tímatalið. Sum er, so ganga helst eini 2 ár, til ein møgulig lóg fer at fáa virknað, og broytingin hevði verið líðandi heldur enn alt í einum. Eingin veit, hvussu arbeiðsloysið er til ta tíð. Somleiðis kann ein styttri arbeiðsvika hava við sær, at arbeiðsfjøldin í Føroyum veksur, tí Danmark, ið vit einamest kappast við, hevur 37 tíma arbeiðsviku

Nógv av tí tað kostar at minka arbeiðsvikuna verður vunnið inn aftur. Tá ein hevur stytt arbeiðsvikuna uttanlands, hevur ein sæð, at nøgdsemi, lívsgóðska og frávera á arbeiðsplássum eru batnað. Sjúkradagarnir og arbeiðsskaðar fækka. Eisini sæst sum oftast, at dygdin og effektiviteturin á tí, sum fólk gera, økist. Tí hevur ein nógv dømi um arbeiðspláss, har framleiðslan og inntøkurnar eru farnar upp, tó at arbeiðstíðin er farin niður. Hetta hongur saman við, at arbeiðsvikan, ið loyvir fólki at arbeiða mest effektivt, tykist at liggja um teir 30 tímarnar.

Ein lóg um arbeiðsvikuna er ein minstulóg. Tað fer framhaldandi at bera til hjá fakfeløgum at avtala eina arbeiðsviku, sum er styttri enn 37 tímar. Arbeiðsvikan kann tó ikki verða longri enn 37 tímar.

# 2 Tíðaravmarkað størv

At starvsfólk verða sett í styttri og tíðaravmarkað størv, er ein avbjóðing bæði í Føroyum og grannalondunum. Dømi eru um, at arbeiðsgevarar heldur enn at seta fólk í fast starv seta fólk í tíðaravmarkað størv. Hesar avmarkaðu setanir verða ofta longdar, viðhvørt fleiri ferðir og í fleiri ár. Umframt at eingin uppsagnarfreist er, er talan um ótrygg størv, har starvsfólk helst aftra seg við at gera síni rættindi galdandi og at verða limir í fakfelag. Sostatt fáa starvsfólk í hesi støðu mangan heldur ikki atgongd til ta hjálp, ið fakfeløg kunnu veita teimum.

## Flokkarnir halda:

***Javnaðarflokkurin:***

*… vit eiga at meta um, hvørjar lógarásetingar skulu til til tess at betra um viðurskiftini hjá fólki í tíðaravmarkaðum starvi.*

***Miðflokkurin:***

*Ótryggleikin, sum spyrst av ikki at vita, um tú í morgin í heila tikið hevur eitt starv, er drepandi...*

***Framsókn:***

*Málið skal viðgerast í álvara í mun til almenna arbeiðsmarknaðarpolitikkin, og tryggjast skal, at lógarkarmar, sáttmálar og avtalur forða fyri misbrúki, men samstundis varðveita neyðuga liðiligheit á føroyska arbeiðsmarknaðinum.*

***Sambandsflokkurin:***

*... tað er ein rættur hjá hvørjum einstøkum at fáa møguleikar at arbeiða fulla tíð ella sleppa upp (aftur) í fulla tíð, um tey vilja tað.*

***Lesið øll svarini í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo***

### *Starvsmannafelagið heldur:*

***At við lóg eigur at verða tryggjað, at viðurskiftini hjá fólki í tíðaravmarkaðum størvum verða betur vard og rættarstøðan tryggjað***

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| *Flokkur* | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | ✓ | | |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | | ✓ | |
| Miðflokkurin | ✓ | | |
| Framtakið | ✓ | | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

# Tíðaravmarkað størv skapa ótryggleika



Samanber ein við donsk tøl, so vóru í 2016 40–50% av teimum, sum vóru tíðaravmarkað sett, sum ynsktu at fáa fast starv. Samstundis vóru tey, sum eru tíðaravmarkað sett, verri fyri fíggjarliga enn onnur.

Tíðaravmarkað størv eru minni trygg enn føst størv. Eftir at setanin er endað, so veit ein ikki, hvørt ein hevur eitt starv ella ikki. Hetta er í sær sjálvum ein kelda til ótryggleika og strongd hjá fólki. Tað er torført at leggja bústað og familjulív til rættis, um ein ikki veit, hvørt ein hevur starv, ella hvør inntøkan er um nakrar mánaðir. Gongur ein út frá, at tað veruliga er neyðugt at seta eitt tíðaravmarkað starv, so er hesin ótryggleikin tó torførur at koma uttanum.

Hinvegin hava tíðaravmarkað størv eisini aðrar neiligar avleiðingar við sær, ið ein kann tryggja fólk ímóti við at tryggja teirra rættindi við lóg. Er ein tíðaravmarkað settur, so er tað skjótt, at eitt starvsfólk ikki krevur síni rættindi og møguleikar, tí starvsfólkið óttast fyri, at tað minkar um møguleikan at fáa starv eftir setanina. Ein klagar ikki um órímilig arbeiðskor, letur kanska vera við at skriva sær yvirtíð, tekur ikki sjúkradagar, tó at ein átti, og leggur nógv fyri, so ein kann økja um møguleikan at fáa starv aftur. Verður hugt at kanningum í t.d. USA og Bretlandi, so síggjast eisini ábendingar um, at fólk í tíðaravmarkaðum størvum uppliva meira ágang og í minni mun boða frá, tá ið tey uppliva slíkt.

Harafturat eru fólk í tíðaravmarkaðum størvum ofta noydd til at fylgja við í, hvørji størv eru leys, senda umsóknir og brúka frítíðina at royna at fáa sær fast starv. Fær ein møguleikan at gera okkurt eyka arbeiði, so er ringt at siga nei takk, tí ein vónar at fáa fótin innum onkrastaðni. Somuleiðis vísir ES-stovnurin Eurofund á, at lívstíðarinntøkan (serliga pensjónin) hjá tíðaravmarkað settum er minni.

Siga vit, at støðan er nakað tann sama í Føroyum sum í útlondum, so eru tað serliga fólk millum 25 og 34 ár, sum eru tíðaravmarkað sett. Ella við øðrum orðum aldursbólkurin, har fólk seta búgv og stovna familjur. Sostatt er trýstið frá ótryggleikanum við fyrbilssettum ikki bara nakað, sum rakar einstaklingar, men kann raka nýklaktar familjur.

Tíðaravmarkað størv kunnu ikki verða eins trygg og føst størv, men við eini lóg, sum tryggjar fólki í tíðaravmarkaðum størvum somu rættindi við setan og verjir fyri, at tíðaravmarkað størv verða misnýtt, við at tey verða longd ferð eftir ferð, ber tó til at bøta munandi um støðuna hjá hesum starvsbólkinum. Hetta kann eitt nú gerast við at fáa eina orðing inn í funktionerlógina saman við eini serlóg um tíðaravmarkað størv.

# 3 Starvsfólk í parttíðar størvum

Kanningar vísa, at nógv fólk arbeiða niðursetta tíð. Hetta er eisini galdandi fyri limirnar í Starvsmannafelagnum. Serliga er tað ein stórur partur av kvinnum, sum arbeiðir niðursetta tíð, tó at fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, kundi hugsað sær at arbeitt meira.
Støðan hevur fíggjarligar avleiðingar fyri starvsfólkini í niðursettari tíð og fyri familjur teirra og ávirkar pensjónsuppsparingina.
Stóra talið av kvinnum í niðursettari tíð er sostatt eitt av størstu vandamálunum, tá ið um ræður javnstøðu í Føroyum.
Fólk, sum vilja arbeiða niðursetta tíð, eiga at sleppa tað; eisini um tað er eitt fyribils ynski. Men øll, sum vilja tað, eiga at sleppa upp (aftur) í fulla tíð.

## Flokkarnir halda:

**Tjóðveldi:**
*Útgangsstøðið eigur altíð at vera, at fólk arbeiða fulla tíð, men hava góðar møguleikar fyri at arbeiða niðursetta tíð, um tey sjálv ynskja tað.*

**Framsókn:**
*Eins og í spurninginum um arbeiðsvikuna, eigur at verða hugt at, um summi starvsøki eru so mikið tung, at arbeiðsvikan er styttri enn tann annars galdandi.*

**Sjálvstýri:**
*Hetta er ein náttúruligur partur hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at umrøða og viðgera sínámillum.*

**Javnaðarflokkurin:**
*Í Javnaðarflokkinum vilja vit gera okkara til at tryggja, at starvsfólk, sum vilja upp í tíð, skulu fáa møguleika fyri tí.*

**Lesið øll svarini í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo**

## Starvsmannafelagið heldur:

***At starvsfólk, sum vilja tað, eiga at fáa møguleika at arbeiða fulla tíð ella at fara upp í tíð***

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| Flokkur | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | ✓ | | |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | | ✓ | |
| Miðflokkurin | | ✓ | |
| Framtakið | ✓ | | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

# Niðursett tíð – niðursett lívsinntøka

Nýggjastu tølini frá Hagstovuni vísa, at í 2013 arbeiddu 9.800 føroyingar niðursetta tíð. Hetta svarar til 36% av teimum, sum arbeiða. Serliga eru tað kvinnurnar, sum arbeiða niðursetta tíð. 7.006 kvinnur arbeiddu niðursetta tíð, og svarar hetta til 57% av teimum kvinnunum, sum arbeiða.

Taka vit teir 974 limirnar hjá Starvsmannafelagnum, sum í 2017 arbeiddu hjá tí almenna, so líkjast tølini. 307 fólk arbeiddu niðursetta tíð, sum svarar til 31,5% av samlaða talinum, harav 90% av teimum 307 eru kvinnur. Samanumtikið arbeiddu 43% av kvinnunum niðursetta tíð. Bankarnir, Javnstøðunevndin og búskaparfrøðingar bæði í Føroyum og uttanlands eru samd um avleiðingarnar av hesum. Lívsinntøkan hjá teimum, sum arbeiða parttíð, minkar.

Ein búskaparfrøðingur vísti longu í 2012 á, at serliga í einum so dýrum samfelagi sum Føroyum verður tað torført hjá einum persóni, ið arbeiðir niðursetta tíð, at klára seg uttan hjálp frá einum maka. Hetta kemur serliga til sjóndar í búskaparligu javnvágini millum kynini, har Javnstøðunevndin vísir á, at parttíðararbeiði er partur av orsøkini til, at í ellisárunum er stórur fíggjarligur munur millum kynini. Mannfólkini eiga meira og liva samstundis styttri. Sammetir ein við donsk tøl, so missa fólk í umsorganarvinnuni 2,3 milliónir í løn, um tey arbeiða 30 tímar heldur enn 37 tímar alt lívið, og 300.000 krónur í pensjón.

Velja fólk sjálvi at fara niður í tíð ella at arbeiða parttíð, so eiga tey sjálvandi at sleppa tað, tá ið tað ber til. Hetta verður tó til ein trupulleika, um fólk arbeiða parttíð móti sínum vilja. Manntal vísti í 2011, at fimta hvør kvinna, sum arbeiðir niðursetta tíð, vil arbeiða meira. Sammeta vit við tølini frá 2013, so svarar hetta til, at 1.401 kvinna arbeiðir niðursetta tíð móti sínum vilja. Hetta eigur at kunna loysast við at geva teimum rætt til at fara upp í tíð, serliga nú arbeiðsloysið er so lítið.

Vóru tað einamest tey vælløntu, sum arbeiddu niðursetta tíð, so kundi ein kanska sagt, at hetta ikki hevur so stórar avleiðingar. Sambært kanningini hjá Starvsmannafelagnum í 2017, so er hetta tó ikki so. Tað eru teir limir felagsins hjá tí almenna, sum vinna minst pening, ið arbeiða mest niðursetta tíð.

Í lønarbólki 1 hjá Starvsmannafelagnum, ið vinnur millum 19.000 og 23.000 krónur um mánaðin, eru tað góð 60%, sum arbeiða niðursetta tíð, og í lønarbólki 2 eru tað 45%. Miðaltalið var annars 31,5%. Sostatt eru tað tey, sum vinna minst pening, ið arbeiða niðursetta tíð. Fólk eiga at hava møguleikan at klára seg sjálvi við at arbeiða fulla tíð, um tey vilja tað.

Arbeiðspláss eiga at virka fyri hesum endamáli og taka neyðug stig, sum gera tað møguligt, uttan at tað hevur við sær aðrar neiligar avleiðingar fyri arbeiðsmarknaðin.



# 4 Greið mørk millum arbeiði og frítíð

Javnvág millum arbeiði, frítíð og hvíld. Líka síðani løntakarar av fyrstan tíð fóru at skipa seg í fakfeløg, hevur tað verið eitt aðalmál at fáa samanhangandi hvíld og frítíð, ið loyvir einum at gera annað enn at arbeiða. Tó at sáttmálar og arbeiðsmarknaðarlóggáva stuðla hesum, eru í dag greið tekin um. at mørkini eru farin at kámast. Javnvágin er komin undir trýst. Nýggj tøkni og arbeiðsgongdir hava gjørt, at arbeiðslívið er farið at breiða seg til frítíð og hvíld. Í ringasta føri kann gongdin hava heilsuligar og fíggjarligar avleiðingar fyri einstakligar, familjur og samfelagið.

### Starvsmannafelagið heldur:

***At arbeiðsgevarar og politiska skipanin eiga við hóskandi tiltøkum at tryggja, at markið millum arbeiðslívið og frítíðina ikki verður skeiklað***

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| Flokkur | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | ✓ | | |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | | ✓ | |
| Miðflokkurin | ✓ | | |
| Framtakið | ✓ | | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

### Flokkarnir halda:

**Framsókn:**
*Politiska skipanina eigur sín part av ábyrgdini fyri, at Føroyar verða eitt land, har vit hava eina góða javnvág ímillum arbeiði og frítíð.*

**Sambandsflokkurin:**
*... arbeiðsgevarar og politiska skipanin eiga at tryggja ella skipa so fyri, at markið millum arbeiðslívið og frítíðina ikki verður skeiklað.*

**Sjálvstýri:**
*Spurningurin eigur at verða viðgjørdur millum partarnir á arbeiðsmarknaðinum.*

**Tjóðveldi:**
*... tað eigur at vera eitt greitt mál hjá bæði arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum at arbeiðstíðin er væl definerað, og at frítíðin er effektiv frítíð.*

*Lesið øll svarini í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo*

# Greið mørk fortreyt fyri trivnaði

Greið mørk og ein góð javnvág millum arbeiði og frítíð eru ein fortreyt fyri góðari kropsligari og sálarligari heilsu. Harumframt gevur ein góð javnvág betri lívsnøgdsemi eins væl og betri og effektivari arbeiði, tá ið ein er til arbeiðis.

Kanningar kring allan heim vísa greitt, at ein neilig avleiðing av tøkniligu menningini er, at fólk hvíla minni og fáa størri trupulleikar við vantandi svøvni. Mátin, arbeiðspláss brúka tøknina, og nýggjar arbeiðsgongdir gera somuleiðis sítt til hesa neiligu gongdina.

Frítíð og svøvnur eru avgerandi fyri heilsuna hjá fólki. Her er tað ikki nóg mikið, at fólk eru heima ella sita niðri, tá ið tey hava frí. Tey mugu hava møguleikan at sleppa arbeiðinum heilt og fáa samanhangandi frítíð, har tey kunnu savna seg um okkurt annað. Við teldupostum, fartelefonum og farteldum er hetta vorðið ein avbjóðing. Fólk bæði ringja og skriva uttan fyri arbeiðstíð, og tað liggur ein væntan um og eitt trýst á, at einstaki løntakarin eisini svarar og arbeiðir uttan fyri arbeiðstíð.

Tøkni er tó ikki einasta avbjóðingin í so máta. Arbeiðstiltøk, ið verða løgd uttan fyri arbeiðstíð, skulu ofta eitast at vera sjálvboðin og ólønt, men tað fremur ikki karrierumøguleikar ikki at møta til tiltøkini.

Avleiðingarnar av, at frítíðin verður brotin sundur og skeiklað, eru greiðar – strongd, hjartatrupulleikar, vantandi svøvnur, niðursetta heilsu sum heild og so framvegis.

Tað er tó ikki bara heilsan hjá einstaka løntakaranum, ið verður ávirkað. At taka arbeiðið við heim leggur trýst á parløg og tekur tíð frá børnum. Sostatt kann vantandi javnstøða millum frítíð og arbeiði hava við sær, at sambandið millum børn og foreldur viknar, og at foreldrini hava minni tíð at menna, uppala og stuðla børnum sínum. Hetta kann aftur hava neiliga ávirkan á skúlagongd og trivnað hjá børnunum.

Harumframt eru vantandi mørk ikki góð fyri arbeiðsúrtøkuna. Starvsfólk verða troyttari, fáa verri hugsavnað seg og arbeiða seinni. Tíðin, ein brúkar í frítíðini at arbeiða, tekur sostatt frá effektivu arbeiðstíðini sum heild og hevur sambært flestu kanningunum við sær, at fólk framleiða minni, enn tey høvdu gjørt, um tey hvíldu. Um nakað benda kanningar á, at 8 tíma hvíld er ov lítið, um ein vil hava bestu arbeiðsúrtøkuna.

Starvsmannafelagið metir, at arbeiðsgevarar hava skyldu at ansa eftir javnvágini millum arbeiðslív og frítíð og hvíld, og at arbeiðsgevarar og politiska skipanina eiga at tryggja hesa javnvágina við ítøkiligum tiltøkum. Ein kann eitt nú fáa íblástur frá londum og stovnum, har ein ikki loyvir tøkniligum samskifti at koma fram, ið verður sent uttan fyri arbeiðstíð, fyrr enn næsti arbeiðsdagur byrjar. Somuleiðis kann ein bera so í bandi, at flex arbeiðstíð altíð hevur heilt greiðar avtalur, ið tryggja, at mista frítíðin kann takast inn aftur.



# 5 Førleikamenna starvsfólk

Vaksnamannaútbúgving og lívlong læra eru grundarsteinar undir einum væl virkandi arbeiðsmarknaði. Talgilda samfelagið fer at seta stór krøv til umstilling og útbúgving, tí nógv størv fara at hvørva, og nýggj koma í staðin. Sáttmálarnir hava ásetingar um strategiska førleikamenning av starvsfólkunum. Kanningar millum álitisfólkini hjá Starvsmannafelagnum benda tó á, at ásetingarnar um førleikamenning verða ofta ikki hildnar, og at tað er ein trupulleiki, at arbeiðsplássini ikki hava fíggjarligar játtanir til vaksnamannaútbúgvingina.

## Flokkarnir halda:

***Framtakið:***
*Hettar er lætt at "misbrúka" á almennum arb plássi. Skeið osv bara fyri at hava skeið osv."*

***Miðflokkurin:***
*Tí eiga tað almenna og privata vinnulívið at taka lógvatak og í felag tryggja arbeiðstakaranum hesar førleikar.*

***Javnaðarflokkurin:***
*Vaksnamannalæra og førleikamenning eru avgerandi tættir í sosialdemokratiska vælferðarsamfelagnum. Tí eru vit sannførd um, at hetta økið skal raðfestast politiskt.*

***Sambandsflokkurin:***
*Hetta er neyðugt fyri at tryggja dagførda vitan og effektivitet í almennu skipanunum, ið skal veita øllum eina dygdargóða og effektiva tænastu.*

***Lesið øll svarini í fullum líki á www.starvsmannafelag.fo***

### Starvsmannafelagið heldur:

***At vaksnamannaútbúgving og førleikamenning mugu raðfestast politiskt og skipast við lóg, og sum partur av hesum skal markaður peningur játtast stovnunum, so at sáttmálaásetingarnar kunnu fremjast í verki***

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| *Flokkur* | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | ✓ | | |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | ✓ | | |
| Miðflokkurin | ✓ | | |
| Framtakið | | ✓ | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

# Førleikamenning gevur trygd og møguleikar



Komandi tvey áratíggjuni bendir alt á, at ovurstórar broytingar fara at verða á arbeiðsmarknaðinum kring allan heim. Flestu metingarnar benda á, at millum ein triðingur og helvtin av øllum heimsins núverandi størvum fer at hvørva vegna tøkniliga nýmenning av talgilding og manngjørdum viti. Hetta merkir tó ikki neyðturviliga eitt arbeiðsloysi upp til 50%, tí samstundis verða nýggj arbeiðspláss skapt. Avbjóðingin verður at tryggja, at tey, ið missa arbeiðið, hava førleikarnar til at arbeiða á nýskaptu arbeiðsplássunum.

Tískil verður neyðugt at uppraðfesta vaksnamannaútbúgving munandi fyri at tryggja fólk móti arbeiðsloysi. Við løgtingsslóg um førleikameting, álitinum um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil og aðalorðaskiftinum um hetta sama hevur politiska skipanin sett eina tilgongd í verk rætta vegin. Men tað er framvegis neyðugt at tryggja, at starvsfólk fáa kravdu og neyðugu vaksnamannaútbúgvingina, og at politiska skipanin heldur fast í teimum ætlanum, hon hevur.

Førleikamenning hevur ikki bara við sær, at fólk kunnu standa ímóti teimum broytingunum, ið eru ávegis, og varðveita sítt búskaparliga lívsgrundarlag. Førleikamenning hevur eisini við sær, at fólk kunnu átaka sær nýggjar fakligar avbjóðingar, eins og tær tryggja, at arbeiðspláss altíð hava starvsfólk við teimum kvalifikatiónunum, sum tørvur er á. Sostatt loyvir tað bæði tí einstaka at menna seg og átaka sær meira spennandi uppgávur, um ynski er um tað, og tað gevur arbeiðsplássum starvsfólk við nýggjum førleikum, sum longu hava bakgrundsvitan og kenna arbeiðsplássið. Harumframt vísa kanningar eisini, at førleikamenning í sjálvum sær er góð fyri trivnaðin og nøgdsemið hjá starvsfólkum.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava longu viðurkent tørvin á førleikamenning, við at tað eru ásetingar um strategiska førleikamenning í sáttmálunum. Fyri at hetta verður til veruleika, so krevur tað tó, at tað ikki bara er nakað, sum ein semist um til samráðingar, men at politiska skipanin eisini vísir hetta í verki við at skipa førleikamenning og vaksnamannaútbúgving við lóg og játta og marka pening til stovnar, so at sáttmálaásetingarnar kunnu fremjast í verki.

# 6 Livikorskanningar um løntakaran

Góð og dagførd hagtøl og upplýsing eru ein týðandi fortreyt, um vit skulu kenna korini hjá føroyskum løntakarum. Skulu vit betra um arbeiðs- og lønarkor, mugu vit vita, hvussu støðan hjá løntakarunum í veruleikanum er. Fakfeløgini og arbeiðsgevararnir eiga at standa fyri einum parti av hesum arbeiðinum. Men tað almenna og politiska skipanin hava ein týðandi leiklut. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru farnir undir eitt útgreiningararbeiði um løn og arbeiðstíð, eins og ætlanir eru um at gera ein leist til eina felags almenna lønarskipan. Tað er gott, men harafturat er avgerandi neyðugt, at serliga Hagstovan í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum áhaldandi savnar lyklahagtøl um arbeiðsmarknaðin og ger regluligar livikorskanningar, sum lýsa viðurskiftini hjá føroyskum løntakarunum.

## Flokkarnir halda:

**Sjálvstýri:**
*Eitt slíkt mál sum hetta er ein náttúruligur partur av arbeiðinum hjá Hagstovuni, og tað hevur týdning at Hagstovan er óheft av serstøkum áhugamálum.*

**Javnaðarflokkurin:**
*... politiska skipanin skal játta neyðuga peningin til at fáa haldgóða og dagførda upplýsing um arbeiðsmarknaðin og lívskorini hjá arbeiðstakarunum.*

**Tjóðveldi:**
*Holl og áhaldandi dagførd vitan um arbeiðsmarknaðin og tey, ið har virka, er ein fortreyt fyri øllum betringum arbeiðstakarunum at frama.*

**Framtakið:**
*Vit vita at alment arb pláss ikki eru serliga effektiv... Sannleikan eiga vit aldrin at verða bangin fyri.*

## Starvsmannafelagið heldur:

***At politiska skipanin skal raðfesta og játta pening til at útvega og almannakunngera haldgóða og dagførda upplýsing um arbeiðsmarknað og lívskor hjá arbeiðstakarunum***

**Tekur flokkur tykkara undir við hesum?**

| Flokkur | Ja | Lutvíst | Nei |
|---|---|---|---|
| Sambandsflokkurin | ✓ | | |
| Javnaðarflokkurin | ✓ | | |
| Sjálvstýri | | ✓ | |
| Tjóðveldi | ✓ | | |
| Framsókn | | ✓ | |
| Miðflokkurin | | ✓ | |
| Framtakið | ✓ | | |
| Fólkaflokkurin hevur ikki svarað | | | |

# Fortreyt fyri semju og framstigum



Uttan almenn hagtøl og greiningar av hesum hagtølunum er tað torført at vita, hvussu ein kann betra um lívskorini hjá fólki. Hvørjum hava fólk brúk fyri? Hvat er nóg gott? Hvat er týdningarmest? Á nógvum økjum í Føroyum vita vit hetta ikki, sum er, og tó at vit í nógvum førum hava tølini, so tróta greiningar av hesum tølunum.

Vantandi hagtølini hava avbjóðingar við sær á fleiri økjum. Vantandi hagtøl kunnu gera tað torførari at semjast, tá ið um ræður samráðingar um lønar- og arbeiðskor. Uttan óheft hagtøl verður tað skjótt pástandur móti pástandi, har partarnir halda fast í hvør síni fatan av, hvussu støðan veruliga er. Framleiðir annar parturin hagtøl, er tað skjótt, at hin parturin kann pástanda, at tølini eru sett upp fyri at geva øðrum partinum ein fyrimun, við tí úrsliti, at løntakarin er taparin.

Somuleiðis er tað torført bæði hjá fakfeløgum, arbeiðsgevarum og politisku skipanini at meta um, hvørji tiltøk tað er, sum ein skal seta í verk, um ein ikki hevur hagtøl. Uttan tøl verða tað tey, sum rópa harðast og duga best at koma fram við sínum sjónarhorni, ið seta dagsskránna. Men tá er torført at vita, um tey umboða ein størri bólk, ið hevur somu upplivingar og avbjóðingar. Tey, ið eru ringast fyri og hava mest brúk fyri at verða raðfest, hava vanliga minst yvirskot og tíð til at gera vart við, at tey hava brúk fyri betri lívskorum. Uttan greiningar og frágreiðingar er tað sera torført at koma uttan um hesa avbjóðingina.

Harumframt er tað torført at meta um, í hvussu stóran mun tiltøk og semjur ávirka lønar-, arbeiðs- og lívskorini hjá fólki sum heild, um ein ikki hevur hagtøl. Ein kann røkka semjum, ein kann seta tiltøk í verk, men ofta hava tey við sær avleiðingar, sum ein ikki hevði hugsað um, og aðrar tíðir hjálpa tey ikki, hjálpa ikki rætta bólkinum ella hjálpa ikki í nóg stóran mun. Hevur ein hagtølini, er hetta skjótt at fanga. Hevur ein tey ikki, so endar ein skjótt aftur í, at tað verður orð móti orði í eini ósemju.

Tí eru livikorskanningar ein fortreyt fyri semju og framstigum, eins og tær somuleiðis kunnu vera ein liður í at tryggja friðin á arbeiðsmarknaðinum. Alt annað líka er tað lættari at semjast, um partarnir eru samdir um, hvør avbjóðingin er.

Arbeiðið at fáa hesi tølini til høldar eigur at verða gjørt í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.